VIÐMERKINGAR

# Viðvíkjandi ætlaða skattalættanum fyri 2005 og árini frameftir

**Føroya Arbeiðarafelag**

**Havnar Arbeiðsmannafelag**

**Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag**

**Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag**

Við hesum verður mint á, at umboð fyri Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðsmannafelag, Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag og Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag hin 23.11.2004 vóru á fundi við fíggjarnevnd Løgtingsins at umrøða uppskotið hjá samgonguni til skattalætta fyri 2005 og frammeftir og lótu feløgini í hesum sambandi fíggjarnevndini eitt alternativt uppskot til skattalætta fyri 2005.

Á fundinum við fíggjarnevndina vístu fakfeløgini á ymisk viðurskifti, ið eru tengd at uppskotinum hjá samgonguni til skattalætta, ið eru sera óheppin fyri javnvágina í samfelagnum og at fjøld av fólki, ið eru miðallønt og láglønt verða fyri vanbýti, um skattauppskotið hjá samgonguni verður samtykt. Víst varð m.a. á, at:

- Skattalættin hjá samgonguni vendir sosialt skeivt, hetta tí at skattalættin í serligan mun verður latin einstaklingum, ið hava høga inntøku (teimum vælstillaðu) - t.v.s. teimum, ið vinna millum 400.000 kr. og 760.000 kr. árliga.
- Skattalættin hjá samgonguni tænir í serligan mun einum minnilutabólki, ið hevur høgar inntøkur, meðan fjøld av fólki, ið hava miðalinntøkur- og láginntøkur lítlan og ongan skattalætta fáa. ***Persónur, ið vinnur 170.000 kr. árliga fær 365 kr. í skattalætta í 2005, meðan ein ið hevur háinntøku, ið er 670.000 kr., fær 5.990 kr. í skattalætta. Tað vil siga, at ein, ið hevur ársinntøku, ið er 670.000 kr. fær ein skattalætta, ið er gott 16 ferðir so høgur sum tann, ið hevur eina miðalinntøku, ið er 170.000 kr. árliga, fær.***
- Uppskotið hjá samgonguni til skattalætta økir um **inntøkuójavnar** í samfelagnum og breiðkar gjónna millum láglønt og hálønt.
- Uppskotið hjá samgonguni til skattalætta er við til at bróta samhaldsføstu meginregluna um at breiðastu herðarnar mugu bera tyngstu byrðarnar og harvið verða við til at útbyggja og viðlíkahalda vælferðarsamfelagið.

Feløgini vístu á, at uppskotið til skattalætta, ið feløgini løgdu fyri fíggjarnevndina var hepnari og rættvísari enn uppskotið til skattalætta hjá samgonguni, hetta serstakliga tí at:

- Uppskotið hjá fakfeløgunum til skattalætta vendir sosialt rætt og fer skattalættin í serligan mun til fjøld av fólki, ið hava miðalinntøkur og láginntøkur.
- Uppskotið hjá fakfeløgnum gagnar stórari fjøld av borgarum, ið eru miðallønt og láglønt og í ávísan mun háinntøkum - umleið 25.000 skattaborgarar hava inntøku, ið liggur millum 75.000 kr og 400.000 kr. árliga.
- Uppskotið til skattalætta hjá fakfeløgunum virkar inntøkuútjavnandi og er við til at smælka gjónna millum láglønt og hálønt.
- Uppskotið til skattalætta hjá fakfeløgunum kann seta gongd á landsbúskapin, hetta tí at skattalætti, ið verður latin miðalløntum og lágløntum fer til økta nýtslu eftir innlendis vørum — meðan skattalætti til háinntøkur ikki hevur hetta gagnliga og tiltrongda árinið á slaka føroyska búskapin.

Kostnaðurin av uppskotinum um skattalætta hjá fakfeløgunum er nærum 14.mill. krónur lægri enn skattalættauppskotið hjá samgonguni.

Vert er somuleiðis at nevna, at sambært Útvarpi Føroya metir Magni Laksafoss, búskapar-frøðingur, at samanumtikið er uppskotið hjá fakfeløgunum til skattalætta betur skikkað til føroyska búskapin enn uppskotið til skattalætta hjá samgonguni, hetta serstakliga tí at skattalætti til miðallønt og láglønt fer til økta nýtslu av innlendisvørum - t.v.s. til økt vanligt forbrúk - og setir slíkt forbrúk gongd á landsbúskapin, meðan skattalætti til hálønt serstakliga fer til nýtslu í útlondum og/ella til privata uppsparing og hevur skattalætti til hálønt tískil ikki hesa tiltrongdu ávirkan á føroyska landsbúskapin.

Vónandi og væntandi taka politisku flokkarnir uppskotið hjá fakfeløgunum til skattalætta til eftirtektar.

## Miðnámslognbráin

Við bjartari forsjón og vónríkum sinni,
fór vágbingur fúsur við roða á kinni
at festa í hugan ta stórbæru gerð,
tá bøkkin Annita tann fyrsta sker.

Her mentanarborgin ein dag skuldi standa,
av ungdómum glaðum her lív skuldi anda,
ein byrjan og barlast til lívsins kor,
so ljóðaðu tá nøkur fløvandi orð.

Øll frøddust, at ein av náttúrunnar skattum,
skal ríkast av vónríkum ungdómi -- lættum -
sum súgva skal í seg av vísdómsins keldu,
og anda náttúrunnar yndi og veldi.

Men so kom hann aftur - hin køvandi lógvin
- sum ferð eftir ferð sløkti lívið í nógvum.
Ein ísakøld hond og ein lemjandi gjóstur,
sum eyðræna skal hetta vónríka fostur.

Á Havrabø - vakrastu fløtu í Vági,
eitt herverk, sum valla eg orð fyri fái,
er framt - ei av drumbum ei heldur av dølgum
- men trúgv mær av landsins mætastu bjølgum.

At lokka við gomlum og útslitnum fólki
er ómanslig framferð - sum ríkur av skálki.
Ei "antin" vit góðtaka - enn minni "ella",
men bæði vit krevja - lat hamaran fella.

**NePtuN**

# Vestmanna bygdarráð skipað seg

TÍÐINDASKRIV

Vestmanna Bygdarráð, sum tekur við 1. januar 2005, hevur skipað seg.

Borgarstjóri verður Karl A. Olsen, og varaborgarstjóri verður Jón Mikkelsen.

Í Fíggjarnevndini verða, umframt Karl A. Olsen, borgarstjóra, Jákup Oluf Hansen og Øssur Christiansen.

Í Teknisku Nevnd verða: Jón Mikkelsen, Pauli T. Petersen og Øssur Christiansen.

Í Mentunarnevndina verða: Pauli T. Petersen, Jón Mikkelsen og Jóhan Hendrik Hansen.

Í Trivnaðar- og Umhvørvisnevndina verða: Øssur Christiansen, Jákup Oluf Hansen og Marjun S. Olsen.

Í Havnarnevndina verða: Pauli T. Petersen, Jón Mikkelsen og Øssur Christiansen.

# Væleydnaður fundur um støðuna í Fiskivinnuni

TÍÐINDASKRIV
*frá Samhald*

Umleið 70 fólk vóru komin saman á Svangaskarði í gjárkvøldið, har veljarafelagið Samhald skipaði fyri almennum fundi um støðuna í Fiskivinnuni. Fundurin staðfesti enn einaferð, at langt er ímillum sjónarmiðini hjá fiskakeyparum og -seljarum.

Bjørn Kalsø, landsstýrismaður greiddi á fundinum frá, at upprunaliga var ætlanin, at vinnan sjálv skuldi gera semju um sølu og keyp av fiski, men tann royndin miseydnaðist. Tí hevði hann gjørt eitt uppskot, sum hann hevði roynt at lagt mitt ímillum sjónarmiðini hjá pørtunum.

Bjørn Kalsø segði, at tað er ein misskiljing, tá ført hevur verið fram, at landsstýrið ætlar við lóg at tvinga fiskin uppá land í Føroyum. Útlendskir keyparar skulu kunna bjóða uppá fiskin, og skipini skulu kunna sigla beinleiðis av feltinum til útlendska keyparan. Men sølan skal vera í kapping við føroyskar keyparar, segði hann.

### Ikki til stuttleika

Árni Joensen, umboð fyri ráfiskaseljararnar segði, at eingin sendir eitt skip av landinum til stuttleikar. Tað verður bara gjørt, tí at hetta gevur eitt betri úrslit á botnlinjuni.

Um støddarskiljing av fiski segði Árni Joensen, at reiðaríini tora ikki at støddarskilja, tí tey vita ikki, um tey sleppa av við allan tann skilda fiskin. "Ein fyritreyt fyri sølu er, at tað er ein keypari í hinum endanum, og ivasamt er, um nóg mikið av keyparum eru til allan tann skilda fiskin", segði hann.

Árni Joensen mælti til at hava so fáar bindingar sum møguligt í lógini, tí jú fleiri bondini eru, meira darvandi eru tey fyri vinnuna.

### Vilja hava sama møguleika at bjóða

Páll Gregersen, umboð fyri ráfiskakeypararnar segði, at føroyskir fiskakeyparar ynskja at fáa sama møguleika at bjóða uppá fiskin, sum útlendskir keyparar, men samstundis undirstrikaði hann, at tað seinasta sum fiskakeyparar ynskja, er at seljararnir ikki fáa rætta prísin fyri fiskin.

Páll Gregersen fanst at seljarunum, sum hann segði almannakunngera sølurnar, tá prísurin er lágur á uppboðssølu í Føroyum, meðan teir dylja tað sum mansmorð, um teir fáa lágan prís í Skotlandi. Hann vildi við hesum vísa á, at ikki allar sølur uttanlands eru so væl eydnaðar, sum fjølmiðlarnir geva eina mynd av.

### Samdir um Fiskavirking

Hóast langt var ímillum sjónarmiðini hjá ráfiskakeyparum og -seljarum, so var kortini semja um, at almenna fyritøkan "Fiskavirking", átti at verið privatiserað, og eisini funnust Árni Joensen og Páll Gregersen at tí, at Fiskavirking ikki keypir fiskin yvir uppboðssølu. Árni Joensen lýsti hetta við orðunum: "Vit kappast hvønn dag ímóti okkara egnu skattakrónum".

### Lívligt orðaskifti

Fundarfólkið fekk eisini høvið at gera viðmerkingar og at seta spurningar, og henda møguleikan nýttu mong av teimum umleið 70 fólkunum, sum vóru møtt upp til fundin á Svangaskarði í gjárkvøldið.